# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ábendingar til løgtingsval!

Í dag fara føroyingar á fólkatingsval. Sambart veljarakanning, ið Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, bendir nógv á, at Tjóðveldi fær sítt umboð afturvalt. Men stórur spenningur er um, hvør flokkur fær hitt umboðið. Sambart kanningini standa Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin sera javnir, tó at Fólkaflokkurin hevur munin. Tað er tí einki avgjørt og má sigast, at okkara spádómur, ið bygdi á aðrar veljarakanningar, har vit mettu, at Sambandsflokkurin fór at fáa annað umboðið, nú er ógvuliga ivasamur. Nú eru bráddliga bæði Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin væl við í endaspurtinum. Nógv kundi tí bent á, at tann av flokkunum, sum dugir best at reka fólk á val, fer at vinna.

Nú kunnu veljarakanningar verða svikaligar, men hóast formaðurin hjá Tjóðveldinum í gjár vísti á í samrøðu, at veljarakanning so tætt valdegnum kann geva skeiva mynd, so mugu vit kortini staðfesta, at kanningin greitt vísir á, hvør fær fyrsta umboðið. Munurin millum hinar tríggjar flokkarnar er tó so lítil, at her er einki avgjørt.

Formenninir í stóru flokkunum hava markerað seg rættiliga kraftiga seinastu dagarnar, her ikki minst Javnaðarformaðurin. Undirtøkan Høgni Hoydal fær er ikki til at fara skeivur av. Tað vísir seg so eisini, at Jóannes Eidesgaard og Jørgen Niclassen liggja á odda í sínum flokkum, meðan formaðurin í Sambandsflokkinum er yvirhálaður av fyrrv. formanninum, Edmundi Joensen. Jóannes Eidesgaard liggur greitt á odda í Javnaðarflokkinum, meðan Jørgen Niclassen fær harða kapping frá Óla Breckmann.

Áhugavert er eisini at spyrja, hvørja niðurstøðu vit kunnu gera um eitt komandi løgtingsval út frá hesi kanning. Samgongan heldur skansan og væl tað. Aðrir samgongumøguleikar so sum Tjóðveldi og Samband eru ov stuttir og skulu tí hava ein av smærri flokkunum við. Við Miðflokkinum, sum sambart veljarakanningini fær gott og væl 8%, fær slík samgonga meiriluta. Væl hugsandi er at teir stóru flokkarnir fara at aftra seg við í heila tikið at taka ein so sterkan Miðflokk við í eina samgongu. Stóra framgongdin hjá Miðflokkinum kann tí gera, at hann verður verandi í andstøðu. Men Sjálvstýrisflokkurin, sum hevur fingið fleiri nýggj og markant andlit, kann gerast tungan á vágskálini í fleiri samgongukonstellatiónum. Veljarakanningin gevur honum góð 3%, men vitandi, at nógvir av veljarunum helst velja aðrar flokkar/persónar til fólkatingið, so kann hann røkka væl betri úrsliti til eitt løgtingsval og harvið fáa eina lyklastøðu, um verandi samgonga ikki heldur fram. Úrslitið av fólkatingsvalinum verður uttan iva ein sera góð ábending um, hvat vit kunnu rokna við til komandi løgtingsval.

**Sosialurin**

## SEV hækkar elprísin

**Seinastu sjey árini eru elprísirnir ikki hækkaðir, men í fíggjarætlanini fyri 2008 skjýtur stýrið í SEV upp, at elprísirnir hækka 10 oyru fyri kilowatt-tíman. Orsøkin er, at oljuprísirnir eru so høgir sum ongantíð fyrr í søguni. Felagið klárar tí ikki longur at halda tørn ímóti høgu oljuprísunum, um Elfelagið skal rekast á ábyrgdarfullan hátt, skrivar SEV í tíðindaskrivi**

ELVEITING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Oljuútreiðslurnar hjá Sev er nú vorðnar so høgar, at stýrið fyri stovnin hevur gjørt av at hækka elprísin við 10 oyru fyri kilowatt-tíman. Í dag kostar ein kilowatt-tími 111 oyru upp til 10.000 kilowatt-tímar. Millum 10.000 og 100.000 kilowatt-tímar er prísurin 103 oyru og omanfyri 100.000 er hann 99 oyru. Sostatt er talan um eina hækking runt roknað upp á 10 prosent.

»Elprísirnir hava staðið í stað, hóast oljuútreiðslurnar hjá SEV eru hækkaðar úr 25,5 milliónum krónum í 1999 upp í meira enn 70 milliónir krónur í 2007. Mett verður, at oljuútreiðslurnar verða í minsta lagi 103 milliónir krónur í 2008, og samstundis benda seinastu hagtølini fyri elframleiðsluna á, at vøksturin í elsøluni er um at minka niður í einki. Hesin veruleiki hevur við sær, at stýrið mælir til at hækka elprísirnar til bæði privat og vinnu 10 oyru kWt.«, skrivar Sev í tíðindaskrivi.

Stýrið skjýtur eisini upp at útseta viðlíkahaldsarbeiðir fyri milliónа uppHæddir, og tað ber við sær, at elpríshækkingin bert verður 10 oyru kWt. Talan er um viðlíkahaldsarbeiðir, sum skulu gerast seinni, og tá er at vóna, at oljuútreiðslurnar eru tálmaðar, so tað slepst undan at hækka elprísirnar uppaftur meira, skrivar elfelagið.

Høgu oljuprísirnir skunda eisini undir at útbyggja varandi orkukeldurnar. 35 milliónir krónur eru settar av í íløguætlanini til vatnorkuútbygging, og harumframt er peningur eisini settur av til vind- og alduorkuætlanir.



*Høgu oljuprísirnir fara nú at síggjast aftur í elprísunum hjá SEV, ið hækkar við á leið 10 prosentum*

*Savnsmynd*

Vøksturin í elnýtsluni frá 2006 til 2007 er mettur til fimm prosent, og hann er grundaður á tøl fyri fyrstu 10 mánaðirnar í ár. Mett verður at vøksturin í elnýtsluni verður einans tvey prosent frá 2007 til 2008.

Elsølan í 2007 er mett til 252 milliónir kWt. Roknað verður við 278 milliónum krónum í inntøkum í 2008

Úrslitið fyri avskrivingar er mett til 48,3 milliónir krónur, og eftir avskrivingar er rakstrarúrslitið eitt hall upp á 1,6 milliónir krónur.

Fíggjarætlanin fyri 2008 verður løgd fyri umboðsnevndina til góðkenningar á heystfundinum, sum verður á Hotel Føroyum 23. november klokkan 10.00.

**Fakta**

| Ársnýtsla | Fast gjald | Prísur fyri hvønn kWh |
|---|---|---|
| 0 – 10.000 kWh | 480,00 kr. um árið | 1,11 |
| 10.0000 – 100.000 kWh | 1.280 kr. um árið | 1,03 |
| yvir 100.000 kWh | 5.280 kr. um árið | 0,99 |

## Broyt Tórshavn til Havn

**HELGI BREINER**
(Køben)havn Ø



Landsverk vil saman við nøkrum málfrøðingum endurskoða nøkur bygdanøvn. Í einum riti tilmælir nevndin at broyta 12 bygdanøvn - og tilmælið sær fínt út.

Men eisini høvuðstaðurin eigur at fáa broytt navnið. Tí Havnin eitur í fólkamunni ikki Tórshavn - og hevur kanska heldur ongantíð gjørt tað. Nei, høvuðstaðurin í Føroyum eitur Havn: Vit búgva í Havn, vit arbeiða í Havn, vit fara til Havnar osv.

Tí eiga Landsverk og málfrøðingarnir at umhugsa, um ikki høvuðstaðarnavnið skal broytast, so tað passar til fólkamunnin.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.